UTTAN ÚR HEIMI

# Vandi fyri at Darfur verður gloymt

**70.000 fólk eru deyð í ágangi og hungursneyð í Darfur, uttan at altjóða samfelagið hevur gjørt nakað fyri at loysa kreppuna**

DARFUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanski mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch rópar nú enn eina ferð varskó um viðurskiftini í sudanska landspartinum Darfur.

– Har hava 70.000 fólk latið lív, uttan at heimurin hevur rætt hond frá síðu fyri at loysa kreppuna. Tvørturímóti er viðgerðin merkt av kensluloysi og vantandi virðing, skrivar Human Rights Watch í einari nýggjari frágreiðing.

Felagsskapurin gevur serliga Kina og Russlandi skyldina av, at heimssamfelagið bara letur standa til. Tey bæði londini verða løgd undir at hava størri áhuga í sudanska oljutilfeinginum og at fáa sum mest burtur úr vápnasøluni til sudanska stjórnarherin. Í hesum sambandi vísir HRW á, at bæði Russland og Kina hava hótt við at nýta sýtingarrættin í ST-trygdarráðnum ímóti møguligum uppskotum um at seta tiltøk í verk ímóti sudansku stjórnini.

Sambært HRW eru umleið tvær milliónir fólk í Darfur rikin frá húsi og heimi tey bæði seinastu árini, og minst 70.000 eru deyð. Afrikanski Eindarfelagsskapurin hevur sent hermenn til økið, men Human Rights Watch sigur, at hesir hermenninir hava ongar royndir til at loysa eina tilíka kreppu. Tær royndirnar hava vesturlendskir hermenn, men har vantar vilji, sigur HRW.

Eins og aðrir mannarættinda- og hjálparfelagsskapir hevur Human Rights Watch sagt seg stúra fyri, at altjóða samfelagið fer at gloyma støðuna í Darfur, nú heimssamfelagið leggur so stóran dent á hjálpar- og endurbyggingararbeiðið aftan á flóðalduna í Suðurasia.



*Stjórnin hjá George W. Bush hevur útvegað USA eitt nýtt Vietnam, heldur tann kendi senatorurin Edward Kennedy*

# Irak eitt nýtt Vietnam

**– Amerikanska herferðin í Irak er vorðin eitt nýtt Vietnam, heldur tann kendi senatorurin Edward Kennedy**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– USA hevur fingið eitt nýtt Vietnam at dragast við, og tað er George W. Bush, forseti, sum hevur útvegað amerikanarunum tað, segði senatorurin Edward Kennedy í samrøðu við sjónvarpið CBS sunnukvøldið.

Kennedy segði, at tað var skeivt av USA at leypa á Irak, og at stjórnin átti heldur at lagt størri dent á at finna Osama bin Laden. Hann fanst eisini at amerikanska politikkinum í Irak, eftir at sjálvt kríggið endaði:

– Bush-stjórnin sendi alt ov fáar hermenn til Irak at halda skil á, eftir at sjálvt kríggið var liðugt, og tað var eitt stórt mistak at upployse irakska herin, segði Edward Kennedy, sum helt, at stjórnin í Washington er púra ráðaleys.

– Teir megna ikki at leggja eina ætlan fyri framtíðina, men leggja ætlanir fyri ein dag ísenn, og tað er vandamikið, segði tann kendi senatorurin í samrøðuni við CBS.

## Svartskygni í CIA

Amerikanska fregnartænastan ávarar nú um, at tað fer at fáa álvarssamar avleiðingar, at evropearar fáa færri og færri børn, samstundis sum tey eldu gerast fleiri og fleiri.

Í einari nýggjari frágreiðing skrivar CIA, at hendan gongdin kann elva til eina politiska og búskaparliga kreppu. Evropa noyðist at fremja ymsar nýskipanir, og fólk úr øðrum londum mugu sleppa til Evropa fyri at halda arbeiðstólunum gangandi, sigur CIA. Men Evropa fer at tapa kappingina ímóti teimum stóru asiatisku londunum, Kina og India, sum fara at fáa altsamt størri og størri ávirkan á heimsviðurskiftini, skrivar CIA.

Gongdin í Evropa fær eisini avleiðingar fyri NATO, asigur fregnartænastan og vísir á, at tey evropeisku londini fara at hugsa meiri um sína egnu trygd heldur enn at samstarva við onnur lond aðrastaðni í heiminum um trygdina. Úrslitið verður, at NATO verður skúgvað til viks, væntar CIA.

## Zyiang deyður

Fyrrverandi formaðurin í kinesiska kommunistaflokkinum Zhao Zyiang doyði á einum sjúkrahúsi gjáramorgunin. Hann var 85 ára gamal.

Zhao Zyiang varð koyrdur frá sum floksformaður í 1989, tí hann var ímóti, at herurin legði upp í studentamótmælini í Beijing. Tann 3. og 4. juni í 1989 bardi herurin mótmælini niður við sera harðari hond. Eingin veit við vissu, hvussu mong lótu lív, men fleiri metingar siga, at í minsta lagi fleiri hundrað studentar og onnur lógu eftirá. Onnur vilja vera við, at fleiri túsund doyðu.

Tey 15 árini síðani hevur hann sitið í húsavarðhaldi, men seinastu tíðina hevur hann ligið á sjúkrahúsi. Sambært soninum, Liang Fang, hava fleiri ríkisleiðarar vitjað tann gamla formannin á sjúkrahúsinum, men sonurin segði tað ikki vera ráðiligt at upplýsa, hvørjir hesir ríkisleiðararnir eru.

## Dýrur stuldur

Ein dagin í 1992 breyt ein maður í spanska bnýnum Lleida eina mynttelefon upp og stjól tað syndrið, sum var í henni. Tað skuldi hann onmgantíð havt gjørt.

Tað eru fleiri ár, síðani løgreglan avdúkaði, hvør tjóvurin var, men málið hevur drigið út, tí tað gekst illa at fáa tann ákærda at møta í rættinum. Í øðrum førum mátti málið útsetast, tí maðurin var til avvenjingar.

Men nú er málið endiliga avgreitt, og rætturin var náðileysur. Maðurin bleiv dømdur at sita átjan mánaðar í fongsli, og harafturat skal hann gjalda tær umleið 3.000 krónurnar, sum tað kostaði at umvæla mynttelefonina, sum hann breyt upp. Tað má sigast at vera hørð revsing fyri at stjala góðar seks krónur.

## Nýggjur húkur

Ein verksmiðja í Taiwan fer nú undir at gera ein nýggjan húk, sum norðmaðurin Svend Stokkendal hevur uppfunnið.

Tað sermerkta við húkinum er, at hann hevur einki agnhald, men kortini er hann soleiðis háttaður, at agnið fer ikki av. Sjálvur hevur Svend Stokkendal roynt húkin fleiri ferðir, og hann sigur seg ongantíð hava mist fisk við tí nýggja húkinum.

Svend Stokkendal hevur útvegað sær patent upp á at framleiða húkin, og fleiri verksmiðjur uttanlands hava víst húkinum áhuga. Nú hevur uppfinnarin so gjørt sáttmála við eina verksmiðju í Taiwan, sum skal gera 200.000 húkar í fyrsta umfari. Sambært Aftenposten hava fiskimenn í fleiri londum víst tí nýggja norska húkinum áhuga.